# Sparingin fer helst at kosta landinum meir í hinum endanum

**– Tað kostar at seta eina økisterapi í verk, men eg ivist ikki í, at tað fer at spara landinum nógvan pening í hinum endanum, sigur Karin Djurhuus, fysioterapeutur**

ØKISTERAPI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*





*Fysio- og ergoterapi á sjúkrahúsi er ikki meiri enn næstbest. Hinvegin kann økisterapi heima við hús hjá fólki kring landið, bæði spara pening, hækka lívsdygdina og bjarga avvarðandi frá at fara niður við flagginum, sigur Karin Djurhuus, fysioterapeutur*

– Tað er ógvuliga harmiligt, at ætlanin um økisterapi er løgd á hyllina.

Karin Djurhuus er fysioterapeutur á Landssjúkrahúsinum. Í síni tíð var hon eisini nevndarlimur í felagnum hjá fysioterapeutum og tá legði hon nógva orku í at fáa ætlanina um økisterapi setta í verk.

Tí harmar tað hana almikið, at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, nú hevur gjørt av at leggja ætlanina um økisterapi í dvala.

Hann sigur, at nú búskaparliga støðan er farin at versna, vil hann heldur raðfesta grundtænastuna hjá heimarøktini. Somuleiðis hevur hann víst á, at heimarøktin ikki so frægt sum klárar at veita sínar grundleggjandi tænastur og tær vil hann hava at virka, áðrenn nýggjar tænastur verða settar í verk.

Ert tú samd í, at reingerð er ein grundleggjandi tænasta hjá heimarøktini?

– Eg vil treyðugt úttala meg um starvsøkið hjá øðrum. Men eg sigi fyri meg, at hevði eg tørv á røkt, vildi eg heldur fingið fólk heim til mín at vant meg í at gingið trappur, heldur enn at fingið eina fólk inn at gjørt reint. Fekk eg venjing at klára meg sjálv, kundi eg kanska enntá gjørt reint sjálv, sigur Karin Djurhuus. Tí vónar hon inniliga, at gongd skjótt kemur á aftur ætlanina at seta økisterapi í verk, hóast royndirnar vísa, at kemur fyrst steðgur í, kann tað vera trupult at fáa gongd aftur á eitt mál.

Serliga hørm eru tey um, at ætlanin er steðgað, nú hon so smátt varð sett í verk.

– Økisterapeutar eru settir á Sandi og tað var lýst eftir terapeutum aðrastaðni við og onkustaðni var tað enntá komið so langt, at setanarsamrøður skuldi vera við umsøkjarar, tá ið løgtingsvalið varð útskrivað og alt steðgaði.

## Ein sparing sum kostar

Karin Djurhuus dugir sjálvsagt væl at síggja, at talan er um eina sparing.

– Men hetta er ein sparing, sumuttan iva kemur at kosta meir í hinum endanum, sigur hon.

Hon sigur, at sjálvsagt kostar tað at seta eina nýggja tænastu í gildi.

Men hon ivast ikki í, at verður økisterapi innan fysio- og ergoterapi sett í verk um alt landið, fer tað at spara landinum enn meiri pening í sjúkraviðgerð og røkt.

Endamálið við økisterapi er at geva fólki fysio- og ergoterapi heima við hús kring um í landinum.

–Tá ið fólk verða útskrivað av sjúkrahúsi eftir skaða ella sjúku, sum ger, at tey hava tørv á røkt heima, ella sum hevur gjørt, at tey meiri ella minni hava mist førleikan, kunnu økisterapeutarnir ganga inn til teirra at viðgerða tey. Somuleiðis kunnu terapeutarnir verða viå til at leggja eina ætlan fyri, hvussu farast skal fram fyri at tey skulu klára seg so væl sum gjørligt heima.

– Økisterapeutarnir kunnu viðgerða hesi fólkini heima so at tey skjótari vinna førleikan aftur, ella í hvussu so er, ikki missa enn meiri av teirra førleika.

Karin Djurhuus sigur, at hetta kann gerast saman við heimahjálpunum.

Men endamálið er eisini at hjálpa teimum avvarðandi, so at tað verður lættari at vera um tann røktarkrevjandi.

– Endamálið er at venja tey, sum koma illa fyri, at klára seg sum longst í egnum heimi. Talan kann verða um grundleggjandi førleikar, eitt nú at ganga upp og niður ígjøgnum trappur, at reisa seg upp úr einum stóli og annað grundleggjandi.

– Vit eru heilt sannførd um, at koma terapeutar upp í, verður tað nógv lættari, bæði hjá heimahjálpum og avvarðandi, at vera um tann, sum krevur røktina.

– Men so er tað sjálvsagt eisini ein spurningur um at hækka lívsdygdina hjá teimum, sum koma illa fyri.

– Harumframt ivast vit ikki í, at hetta fer at føra til, at mál fara at verða skjótari avgreidd, enn tey hava verið, tí tað verður styttri ímillum brúkaran og tann, gevur ráð og vegleiðing.

## Ikki meiri enn næstbest

Karin Djurhuus sigur, at á sama hátt kunnu økisterapeutarnir verða við til at hjálpa teimum, sum enn hava ein førleika, at varðveita hendan førleikan við at gera venjingar við teimum og at halda teimum í sving.

Økisterapeutarnir hyggja eisini at arbeiðsumstøðunum hjá teimum, sum skulu røkta fólk heima og kunnu koma við tilmælum um broytinga og ábøtur fyri at gera tað lættari. Talan kann bæði verða um at broyta innrættingina í heiminum ella um at útvega serlig tól, sum gera gerandisdagin lættari.

– Ongantíð betri um økisterapeutarnir eisini høvdu eitt úrval av teimum einfaldastu hjálpitólunum, sum tey kundu latið brúkarum eftir tørvi.

Eitt er, at fólk fáa fysioterapi á sjúkrahúsum og hjá privatum viðgerðarum kring landið. Men tað er ikki meiri enn næstbest, tí tað, sum hevur størstan týdning, er at venja tey heima við hús og at fylgja teimum upp alla tíðina.

## Niður við flagginum

Karin Djurhuus sigur, at vit hava ofta lyndi til at samanbera okkum við donsku oynna Borgundarhólm, tí fólkatalið er áleið tað sama. Á Borgundarhólmi hava tey 27 terapeutar kring um í oynni. Í Føroyum hava vit tveir á Sandi, tað er alt.

Fysioterapeuturin sigur, at verður ein slík tænasta sett í verk, fer tað uttan iva at føra við sær, at fólk verða styttri á sjúkrahúsi, bæði tí, at fólk kunnu útskrivast fyrr og tí at tað verður ikki neyðugt at leggja so nógv fólk inn.

– Samstundis vita vit, at ein song á sjúkrahúsi er tann dýrasta loysnin av øllum, men samstundis fer tað eisini at frígeva sjúkrahússengur til tey, sum veruliga hava tørv á at verða innløgd og sum nú standa á bíðilista.

– Tað fer uttan iva eisini at spara røktarheimpláss, tí fólk koma at klára seg longri heima.

– Men samstundis ger ein slík tænasta, at tað verður lættari hjá teimum, sum vara av røktarkrevjandi fólki, tí tað at verða um ein røktarsjúkling, fær nógv avvarðandi niður við flagginum og tað er væl skiljandi, tí tað er ómetaliga tungt, sigur Karin Djurhuus.

– Vit hava í nógv ár havt til endamáls, at fólk skulu kunna vera heima sum longst. Men so mugu vit eisini laga tað soleiðis, at tað ber til at vera heima, sigur Karin Djurhuus.



# Ivast í um rækjuflotin er til í næsta ár

**Føroysk rækjuskip síggja seg svikin í sáttmálum um fiskirættindi – hava fiskað í kørgum vøtnum so lítið sum ein sættapart til ein fjórðing av tí, sum grønlendsk og kanadisk rækjuskip fáa á góðum fiskileiðum**

RÆKJUVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Minni og minni at fiska ár undan ári, alt meðan grønlendingar og kanadiarar rokast; og aftur við stútt fallandi rækjuprísum á heimsins marknaðum, og líka so stútt hækkandi prísum á brenniolju sum harvið hava dýrkað munandi um raksturin… Tá er ikki nógv eftir, tá er ringast hugsandi marrudreymur veruleiki fyri okkara fyrr so stolta rækjuflota, ein rækjufloti sum nú ivast í um hann yvirhøvur er til næsta ár.

Mong teirra, ið varða av teimum restum, sum enn eru eftir av rækjuvinnuni kenna seg svikin og slept upp á fjall av politikarum og embætisfólkum, sum ikki tykjast hava raðfest rækjuflotan í sambandi við sáttmálar við onnur lond um fiskirættindi. Tað kom fram á tí árliga vinnulívsfundinum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag fyrr í vikuni, har júst 'Rækjuvinnan' var eitt av tveimum høvuðs evnum.

Eini 70 fólk vóru komin saman á fundinum fyri at hoyra innlegg frá vinnulívsmonnunum Hans Johannes á Brúgv, Kjartan Joensen og Jóhan Joensen um rækjuvinnuna. Hitt temaið var 'Lønarsteðgur og Skattalætti' og innleggunum har stóðu Karla Einarsson og Bárður Nielsen fyri.

## Úr 12 niður í 5 niður í 0

– Útlitini fyri rækjuvinnuna eru sera ring, skrivar Eysturoyar Vinnulívsfelag millum annað í einari niðurstøðu frá vinnulívsfundinum, har spurningur varð settur við um rækjuflotin yvirhøvur er til í næsta ár.

– Prísirnir eru fallandi, meðan føroyingar ikki megna at fáa fiskiloyvir í økjum, har nógvar og góðar rækjur eru. Hetta setir tann føroyska rækjuflotan í eina verri støðu enn kappingarneytarnar. Eitt føroyskt rækjuskip fiskar 10-15 tons per dag, meðan grønlendingar og kanadiarar fiska 60 tons per dag.

Um rækjuprísirnar varð staðfest, at hesir eru minkaðir niður um eina helvt upp á stutta tíð, samstundis sum oljuprísurin er fleirfaldaður. Karmarnir hjá rækjuvinnuni eru sum heild verri enn hjá øðrum fiskivinnugreinum, varð somuleiðis staðfest - og undirbygt við syrgiligum statistikki yvir talið á føroyskum rækjuskipum.

– Í tíðarskeiðnum 2000/2001 var miðal prísurin fyri eitt kilo av rækjum 21,40. Eitt ár seinni 2001/2002 var prísurin komin niður á 15,40. Í tíðarskeiðnum 2002/2003 fór prísurin niður við einari krónu og fyri 2003/2004 er prísurin komin niður í 10,00 per kilo.

– Í tíðarskeiðnum frá 1999 og tvey ár fram fór oljuprísurin úr 70 oyrum upp í kr 2,68 fyri hvønn litur.

– Karmarnir hjá rækjuvinnuni eru verri enn teir hjá til dømis flakavinnuni. Til dømis verða fiskirættindi keypt til trolararnar og nótaskipini, meðan einki verður gjørt fyri at keypa brúkbar rættindi til rækjuvinnuna.

Vinnulívsfundurin var alt annað enn bjartskygdur um útlitini hjá føroyskari rækjuvinnu, og spáddi henni ein skjótt komandi enda.

– Fyri fáum árum síðani vóru 12 rækjuskip - nú eru tað bert 5 eftir. Spurningurin er so um nær teir seinastu fimm gevast, ikki um teir gevast. Tað varð mett at hesi seinastu fimm skipini møguliga klára seg árið út, um einki verður gjørt fyri at fáa til dømis brúkbarar kvotur.

Síðani varð víst á trupulleikar av GATT tolli í sambandi við framleiðslu av rækjum.

Her eru eisini trupulleikar við at føroyingar eru umleið 6 prosent verri fyri enn kappingarneytarnir vegna GATT toll.

## 30 ymisk feløg

Í niðurstøðuni um 'Lønarsteðg og Skattalætta' varð ført fram, at tær almennu lønirnar hava lyft kostnaðarstigið í Føroyum, heldur enn lønirnar hjá arbeiðsfólkinum.

– Lønarsteðgur ber ikki til, tí um lønarsteðgur skal verða, so má tað eisini blíva prríssteðgur. Tað kundi hjálpt til um Príseftirlitið varð endurstovnað.

– Flakavirkini klára ikki at halda arbeiðsfólkið í arbeiði eina fulla arbeiðsviku. Tí er tað brúk fyri Arbeiðsloysistryggingini í teimum sokallaðu góðu tíðunum.

– Føroya Arbeiðarafelag hevði onga lønarhækking í árunum 1992 til 1998. Men síðani byrjaðu løgtingslimir at hækka sína løn, alment lønt fingu lønarhækkan, so tað var rímiligt, at arbeiðarin eisini fær lønarhækking. Tað einasta sum arbeiðarin krevur er at grøvin millum bólkarnar ikki veksur

– Persónsskattatrekkið er farið frá 36 upp í 38 prosent, har landsskatturin er farin úr 18,5 upp í 21,5 prosent. Ynskir eru frammi um eina meiri proportionala skattaskipan, sum hjá kommununum. 17.000 føroyingar vinna yvir 180.000 krónur um árið. 6.000 vinna undir 50.000 krónur um árið, og her verður eingin landsskattur. Skattastigin er ikki viðlíkahildin seinastu árini, so sjálvt um tað eru givnar fleiri milliónir í skattalætta hesi seinastu árini, er skattatrekkið farið upp.

– Hugskot hava verið frammi um tríparta lønarsamráðingar, men her er trupulleikin, at tað eru umleið 30 ymisk feløg sum samráðast skal við. Men hetta er lættari at gjøgnumføra á privata arbeiðsmarknaðinum tí har eru ikki so nógv feløg.

Áðrenn vinnulívsfundin í Bygdarhúsinum í Leirvík helt Eysturoyar Vinnulívsfelag aðalfund. Har vórðu Áki í Skemmuni og Arni Carlsen valdir í nevndina at sita saman við John E. Olsen og Ragnar S. Olsen; Lassi Borðoy, ið eisini stóð fyri vali, bar seg undan á hesum sinni, og í hansara stað varð valdur Janus Rasmussen. Nevndin hevur skipað seg, og formaður er John E. Olsen, næstformaður Arni Carlsen, kassameistari Áki í Skemmuni, skrivari Ragnar S. Olsen og nevndarlimur Janus Rasmussen.

Vinnudagurin er eitt árligt tiltak sum Eysturoyar Vinnulívsfelag skipar fyri. Fundurin verður hildin ymsastaðni í Eysturoy; fyrstu ferð varð hann hildin í Runavík, síðani á Kambsdali, Oyrabakka, Skála og í ár var Gøtu Kommuna vertur, men flutti fundin til Leirvíkar.

### Fakta

Føroyska rækjuvinnan er ein vinna í svarum trupulleikum:

- Eitt føroyskt rækjuskip fiskar 10-15 tons per dag, meðan grønlendingar og kanadiarar fiska 60 tons per dag.
- Í tíðarskeiðnum 2000/2001 var miðal prísurin fyri eitt kilo av rækjum 21,40. Eitt ár seinni 2001/2002 var prísurin komin niður á 15,40. Í tíðarskeiðnum 2002/2003 fór prísurin niður við einari krónu og fyri 2003/2004 er prísurin komin niður í 10,00 per kilo.
- Í tíðarskeiðnum frá 1999 og tvey ár fram fór oljuprísurin úr 70 oyrum upp í kr 2,68 fyri hvønn litur
- Fyri fáum árum síðani vóru 12 rækjuskip - nú eru tað bert 5 eftir. Spurningurin er so um nær teir seinastu fimm gevast, ikki um teir gevast. Tað varð mett at hesi seinastu fimm skipini møguliga klára seg árið út, um einki verður gjørt fyri at fáa til dømis brúkbarar kvotur



*Mong teirra, ið varða av teimum restum, sum enn eru eftir av rækjuvinnuni kenna seg svikin og slept upp á fjall av politikarum og embætisfólkum, sum ikki tykjast hava raðfest rækjuflotan í sambandi við sáttmálar við onnur lond um fiskirættindi. Tað kom fram á tí árliga vinnulívsfundinum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag fyrr í vikuni, har júst 'Rækjuvinnan' var eitt av tveimum høvuðs evnum*